# Kyllingurin vil aftur í Tour'in

Michael Rasmussen varð í summar partur av stóru gøluni, sum rakti Tour de France súkklukappingina. Enn er ikki greitt, hvør revsingin verður, men sjálvur roknar Rasmussen við, at talan í mesta lagi verður um eitt ára bann. – Tey flestu bíða eftir, hvussu málið fer at enda. Men tað skuldi verið løgið, um einki lið er áhugað í at fáa heimsins besta súkklara við sær, sigur Rasmussen, sum altso framvegis metir seg hava møguleika at vinna Tour de France.



# Beckham er ríkastur

Við eini peningaogn, sum er uppgjørd til 1,12 mia kr. er Davic Beckham ikki óvæntað ovastur á listanum yvir ríkastu ensku fótbóltsspælararnar og spælarar, sum spæla í Onglandi.. Tað er nærum trífalt tað, sum Michael Owen er verdur. Hann sigst eiga 383 mió kr. Hinir á listanum eru Robbie Fowler (311 mió kr.), Wayne Rooney (311 mió kr.), Sol Campbell (291 mió kr.), Andrej Sjevtjenko (259 mió kr.), Rio Ferdinand (259 mió kr.), Ryan Giggs (238 mió kr.), Michael Ballack (186 mió kr.) og Steven Gerrard (155 mió kr.)

Neistin-KÍF 27-25 (13-13):

# KÍF misti á stokkinum

**Í 50 minuttir helt KÍF fast í Neistanum, men seinastu løtuna eydnaðist teimum bláu at toga seg avgerandi framum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kollfirðingar eru enn niðastir í Atlantic Airways-deildini, og Neistin er enn annað av oddaliðunum. Í so máta broytti uppgerðin millum einki leygardagin. Men dysturin undirstrikaði enn einaferð, hvussu lítil munnurin millum liðini í deildini er í ár.

Tí hóast skeridir, nú Gert Hansen aftur er úti við skaða, so var KÍF alla tíðina væl og virðiliga við í dystinum. Serstakliga tykist liðið fáa alt størri nyttu úr Dean Jankovic á strikuni, og tí eru ráðini ikki longur bara at taka Damir Oros úr spælinum hjá KÍF.

At tað so kortini eydnaðist Neistanum at toga stigini heim, hevur kanska fyrst og fremst tvær orsøkir. Onnur er, at sjálvsálitið hjá einum oddaliði náttúrliga er gott, og tí eru spælararnir betri førir fyri at tackla avgerandi løturnar í dystinum.

Hartil hevur KÍF havt ein trupulleika við vantandi breiddini í hópinum. Tað verður kanska lagt ov nógv á einstakar herðar, og tá er tungt at halda liðnum koyrandi í samfullar 60 minuttir. Og tá Neistin hesa ferð fekk møguleikan, tóku teir av. Kollfirðingar høvdu annars skotið seg upp á 19-16, men so steðgaði maskinan púrasta upp. Neistin fekk hinvegin veruliga ferð á, og upp á eitt korter varð støðan broytt til 25-22.

Tað megnaði KÍF ikki at vinna aftur, og so máttu teir enn einaferð ásanna, at teir gjørdust akkurát ov stuttir. Neistin hevur hinvegin fingið glið á sína stigasavnan aftur, og hóast kappingin enn bert er komin í helvt, so tykjast teir í løtuna at vera eitt av teimum báðum bestu boðunum til ein finalusess.



*Enn einaferð gjørdust kollfirðingarnir akkurát ov stuttir. Hesa ferð var tað Neistin, sum í seinastu løtu fekk vissað sær stigini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA

**Neistin-KÍF 27-25 (13-13)**
10 min: 6-4
20 min: 10-7
40 min: 16-19
50 min: 22-21
**Málskjúttar**
**Neistin:** Karl Herup Olsen 9, Tróndur Kragesteen 5(3), Roar Dalsgarð 4, Dann Thorleifsson 3, Ingi Olsen 2, Jugoslav Djumic 2, Blagoje Buha 1, Jón Ludvík 1
**KÍF:** Damir Oros 8, Dean Jankovic 7, Rógvi Weihe 3, Niklas Reginsson 2, Suni Johannensen 2, Ási Dam 1, Toni Weihe 1, Ingi Johannesen 1
**Brotskøst**: Neistin 5
**Útvísingar**: Neistin 2, KÍF 1

**Dómarar**: Karstin Joensen & Kristian Joensen

Neistin-VB 27-23 (12-13):

# Neistin helt finalukósini

VB hevði leingi munin, men tær megnaðu ikki at halda dampinum allan dystin, og so streyk Neistin avstað í dystinum um finaluplássið

Hondbóltur
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Verður sæð burtur frá spennandi botnstríðnum, so er størsti spurningurin í Sunset-deildini, hvør skal fylgja við Stjørnuni í FM-finaluna. Og her tók Neistin eitt stórt fet, tá tær leygardagin vunnu heimadystin móti VB.

Men tað stóð nógv á. Neistin var annars liðið, sum byrjaði betri, men um miðjan fyrra hálvleik fekk VB av álvara glið á. Fram til tá hevði Daiva fyri tað mesta verið tann, sum langaði bóltarnar í kassan, men tá aðrar brádliga byrjaðu at skora, fekk VB veruliga munin í dystinum.

Og tó at Neistin svaraði aftur, so var tað ikki fyrr enn seint í seinna hálvleiki, at tær veruliga sluppu avstað. VB tóktist ikki megna at halda fast í dystinum, og so kundu kviku Neista-kvinnurnar púrasta punktera dystin.

Sigurin ber við sær, at Neistin nú er trý stig framman fyri VB. Enn hevur Neistin tó til góðar at koma á vitjan í Vági. Og lítil ivi man vera um, at júst tann dysturin er størsta vónin hjá VB fyri at røkka enn einum finaluplássi.

## FAKTA

**Neistin-VB 27-23 (12-13)**
10 min: 5-3
20 min: 9-7
40 min: 19-17
50 min: 24-20
**Málskjúttar**
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 9(3), Elin Stakksund 5, Unn J. Kragesteen 5, Ása á Neystabø 4, Anja Heinadóttir 2, Rakul Augustinussen 2
**VB:** Daiva Toumaite 12(3), Svava Vestergaard 3, Laila Jespersen 3, Mariah Milicevic 2, Monika Samuelsen 2, Carol Kjærbæk 1
**Brotskøst:** Neistin 6, VB 3
**Útvísingar:** Neistin 1, VB 4
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen

VÍF-StÍF 22-28 (10-17):

# Bukaði bláir og gulir

**Sjáldan hevur VÍF lagt rygg til slíkan avsmurning, sum teir fingu, tá StÍF vitjaði leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Vit gera alt ov nógv mistøk í álopinum. Fyrsta korterið ella so tveita vit ferð eftir ferð bóltin burtur, og tað verða vit revsaðir fyri. Í veruleikanum verður dysturin avgjørdur longu hesa løtuna, og so er ikki so nógv meira at siga um tað.

Soleiðis svarar Áki Olsen, tá vit spyrja hann um, hvat tað var, sum gekk galið hjá VÍF í dystinum móti StÍF sunnudagin.

Strandingar snøgt sagt avgjørdu dystin hesa løtuna, og tá vestmenningar eisini vóru somikið gestablíðir at endurtaka øll mistøkuni fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, so var púrasta leyst og liðugt. Enn tá í einum dysti, sum VÍF helst ikki skuldi tapa, um teir ætlaðu sær at hanga við í oddastríðnum.

- Nei, tað skuldu vit helst ikki. Vit høvdu StÍF nú, og næstu ferð hava vit Neistan. Høvdu teir báðir dystirnir givið fýra stig, so vildi støðan verið ein heilt onnur. Men nú mugu vit so royna, um vit ikki klára Neistan, heldur Áki.

Tú heldur ikki, at stríðið um finaluplássini er liðugt?

- Nei. Har eru enn tíggju dystir eftir at spæla, so har kunnu nógv stig vinnast. Men vit mugu so síggja veruleikan í eyguni, og hann er, at Neistin og StÍF í løtuni eru nøkur fet framman fyri øll hini, sigur Áki.

## FAKTA

**VÍF-StÍF 22-28 (10-17)**
10 min: 2-7
20 min: 5-12
40 min: 15-21
50 min: 19-24
**Málskjúttar**
**VÍF:** Agnar Joensen 7(1), Niels Andreasen 6, Rúni Joensen 3, Áki Olsen 2, John M. Andreasen 2, Dávur Traber 1, Regin Joensen 1
**StÍF:** Sveinur Justinnussen 7(1), David Edvardsen 6, Bárður Danielsen 5(1), Leivur Justinussen 3, Andre F. Danielsen 2, Danni Syhler 2, Borgar Danielsen 2, Bent Djurhuus 1
**Brotskøst:** VÍF 1, StÍF 4
**Útvísingar:** VÍF 3, StÍF 1
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen